# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Føðingar**
16. apríl fingu Mia og Steen Sørensen, Trongisvágur, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2612 gr.

30. apríl fingu Halldis á Grønastøð og Árni Skaale, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3825 gr.

1. mai fingu Birita Thomsen og Petur Olaf í Lágabø, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3860 gr.

3. mai fingu Eva og Heri Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

5. mai fingu Jórun Heinesen og Sjúrður L. Petersen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3050 gr.

6. mai fingu Jona Dahl og Magnus Bjarnason, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

7. mai fingu Guðrun Vang og Jón Højsted, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

7. mai fingu Renáta og Thorben Gaardbo, Toftir, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3000 gr.

7 mai fingu KAtrin Leo og Fredrik Sjögren, Ljubljana, Slovenia, eina dóttir. Hon var 52 cm long og vigaði 3300 gr.

8. mai fingu Birgit og Heðin Krett, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4200 gr.

---

**Prógv**
Klæmint Isaksen fysioterapeutur hevur, tann 6. mai 2006, tikið Credential próvtøku í Mechanical Diagnostic and Therapy (McKenzie approach) við altjóða McKenzie Institutti.

Hjørleif Niclasen fysioterapeutur hevur, tann 6. mai 2006, tikið Credential próvtøku í Mechanical Diagnostic and Therapy (McKenzie approach) við altjóða McKenzie Institutti.

**Brúdleyp**
Leygardagin 13. mai kl. 12.00 giftast í Betesda í Klaksvík, Elin Østerø, Nuuk, Grønland og Sámal Sørensen, Mikladal. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Norð á Viðareiði.

Leygardagin 13. mai kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Maibritt Trondesen og Hjalmar Ingebrigtsen, Válur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

Leygardagin 13. mai kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Karina Joensen, Klaksvík og Mikkjal Pauli Lamhauge, Tórshavn. Veitslan verður hildin í Skálanum fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Tann 9. mai høvdu Anna og Justinus Poulsen, Hvannasund, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima 12. mai Dýra biðidag frá kl. 15.00.

## Petur Christiansen farin



Týsmorgunin 9. mai andaðist Petur Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri í Havn, 82 ára gamal. Hann doyði á Lágargarði, har hann hevði verið í fleiri ár.

Petur var havnarmaður, føddur 28. juli 1923. Foreldrini vóru Katrina, f. Petersen, og Viggo Christiansen. Petur var álitismaður í øllum hann tókst við, vinskipiligur og ágrýtin í øllum, hann var partur av.

Eftir millumskúlaprógvið á Føroya Millum- & Realskúla í 1938 fór Petur í smiðjlæru hjá mammubeiggjanum Wenzeli Petesen. Hann leyk motor- og maskinpassararoyndina í 1944 og maskinstprógvið í 1945 á Færøernes Navigationsskole (nú Føroya Sjómansskúli). Handverkararoyndina tók hann á Teknologisk Institut í 1947 og víðkaða maskinmeistararoyndina í 1950 og elektroinstallatørroyndina fyri maskinistar í 1953 á Københavns Maskinmesterskole.

Eitt skifti sigldi Petur sum meistari við Smirli og við trolarunum Torfinni og Tór 2.

Í 1953 fór hann í lærarastarv á Føroya Sjómansskúla, og seinni var hann lærari og fyribilssettur stjóri á Føroya Maskinskúla 1965-70.

Petur var fólkafloksmaður, og í seksti og sjeyti árunum var hann valdur bæði í býráðið og í tingið. Hann varð valdur í býráðið í 1960, og hann sat út í eitt, inntil hann á býráðsvalinum í 1980 ikki bjóðaði seg fram aftur. Tá hevði hann í níggju ár verið borgarstjóri, sum ivaleyst er tað, hann er best kendur fyri. Havnin vaks eisini nógv í hesum tíðarskeiðnum, og Petur stóð á odda, tá ið týdningarmiklar útbyggingar vóru gjørdar sum eitt nú R. C. Effersøesgøta, handilsmiðdepulin á Trapputrønni, útstykkingin á Kommansmýru og havnarútbyggingar.

Petur var valdur í Løgtingið í 1966 og sat fram til 1970. Hann var stýrislimur í SEV 1960-64 og 1965-73. Varð riddari av Dannebrog í 1973.

Longu tá Petur fór frá sum borgarstjóri, var hann merktur av parkinsonsjúkuni, sum tók sera hart upp á hann. Í 1987 flutti hann inn á Lágargarð, og var hann eitt av fyrstu búfólkunum har.

Í ungu árunum var hann sera virkin í Losjuni. Hann var formaður í Ungmannadeildini, sum tá mundi vera ídnasta ungmannafelag í Havn. Hann var felagsformaður, tá ungmannadeildin í 1946 hevði stóra lutaseðlasølu, hetta hevur helst verið fyrstu ferð, at ein bilur hevur verið burturlutaður, talan var um ein Ford Prefekt, eisini vórðu ein motorsúkkla og ein vanlig súkkla burturlutað. Tiltakið var til frama fyri summarhús, sum felagið skuldi byggja oman fyri Oyggjarvegin.

Í hansara formanstíð hevði felagið t.d framførslu í Sjónleikarhúsinum. Tað var sangleikurin "Eydnusælar løtur", sum Petur Michelsen skrivaði.

Petur Christiansen giftist í 1949 við Onnu, ættað av Strondum, dóttur Janu og Johan M. Fr. Poulsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin í hálva øld, frá 1920-70.

Anna og Petur búsettust við Grønlandsvegin í Havn, og tey eiga tríggjar dreingir, sum allir búgva í høvuðsstaðnum – Viggo, Johan og Jan, sum varð borgarstjóri í Havn frá 2001-2005 og hevur sitið í býráðnum síðan 1984.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni Dýra biðidag klokkan 14.

**Dagurin**

**12. mai. Pancratius**, deyður í umleið 300. 13 ára gamal drongur, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

**13. mai. Ingenuus**. Rómverskur kristin hermaður, sum keisarin Decius læt drepa.

**14. mai. Kristjan**. Teir vita einki um at nakað halgimenni við hesum navni. Navnið er latínskt, gjørt eftir grikska navninum Kristos, sum aftur er ein týðing av tí hebráiska messiah, ið merkir salvaður.

**15. mai. Halvarðsøka**, fyrr í tíðini eisini rópt halvarðsmessa. Verður hildin til minnis um Hallvarð, systkinabarn Ólavs hin Heilaga. Halgisøgan sigur, at tá ið hann skuldi hjálpa einari konu móti yvirgangskroppum, varð hann sjálvur dripin og søktur í Drammensfjørðin við einum myllusteini um hálsin. Men líkið flotnaði og varð kórsett í dómkirkjuni í Oslo. Hann doyði ár 1042 og er verndarhalgimenni hjá býnum Oslo. Navnið er norrønt og merkir hella og verja.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin